FYLGISKJAL 4

LM-048/2020

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra: Poula Lervig
Sendt: 3. september 2020 08:24
Til: Elsa Magnussen
Emne: VS: 20/00545 - Til hoyringar: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin (Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru) v.m.
Vedhæftede filer: image002.wmz

Hey Elsa, hetta er nokk komið skeivt til mín.

Vh
Poula

Fra: Anna Dam <annadam@bvs.fo>
Sendt: 3. september 2020 08:16
Til: Poula Lervig <poulal@amr.fo>
Emne: sv: 20/00545 - Til hoyringar: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin (Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru) v.m.

Góða Poula,

Barnaverndartænasturnar og Barnaverndarstovan hava hesar viðmerkingar til uppskotið til broyting í løgtingslóg (Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru) v.m. . har skotið verður upp at:

1. *Í § 22 verður aftaná stk. 7 sum nýtt stk. sett:*

"Stk. 8. Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur."

Barnaverndartænasturnar meta, at tað er ov krevjandi umsitingarliga, at gera eina tørvsmeting av fíggjarstøðuni hjá foreldrunum fyri at meta um, hvørt tey megna at bera útreiðslurnar sjálvi. Slík meting, kann eisini verða orsøk til tvístøður og til vansa fyri samstarvið við foreldrini og tí mæla vit til, at ásett verður, at endurgoldið verður eftir takstunum hjá Strandfaraskip Landsins. Har tað ikki er møguligt at nýta almenna ferðslu, kann endurgjaldast eftir takstunum hjá Fíggjarmálaráðnum fyri ferðing í egnum bili. Sum vit skilja so verður slík skipan nýtt í Danmark.

Vinarlig heilsan

Anna Dam

Løgfrøðiligur ráðgevi

Barnaverndarstova Føroya
TELEFON (+298) 30 24 80 | MOBIL (+298) 519082
R. C. Effersoesgota 26, 100 Tórshavn
annadam@bvs.fo
WWW.BVS.FO

LM-048/2020

Fra: Almannamálaráðið [mailto:amr@amr.fo]
Sendt: hósdagur, 9. juli 2020 15:03
Til: Stovnur Barnaverndarstova Føroya <bvs@bvs.fo>; Marjun Berg <marjunb@torshavn.fo>; Stovnur kommunufelagið <kf@kf.fo>; Almannaverkið <av@av.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Cc: Marjun Magnussen <marjun.magnussen@amr.fo>; Eyðun Mohr Hansen <eydun.mohr.hansen@amr.fo>; Elsa Magnussen <elsa.magnussen@amr.fo>
Emne: 20/00545 - Til hoyringar: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin (Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru) v.m.

Góðan dagin

Við hesum verður sent til hoyringar

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin) (Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru)
- Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um samsýning til fosturforeldur (Lummapeningur)
- Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum (Strika upphæddir sbrt. kunngerð um samsýning til fosturforeldur)
- Uppskot til leiðbeining um lummapening til børn, sum eru sett heiman

Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa til vega greiða heimild til barnaverndartænasturnar at gjalda ferðaútreiðslur í sambandi við samveru eftir barnaverndarlógini.

Endamálið við lógaruppskotinum er somuleiðis at fáa til vega greiða heimildat at javna veitingar við heimild í barnaverndarlógini sambært løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar. Ætlanin er, at javnaðu upphæddirnar á hvørjum ári verða kunngjørdar í rundskrivi, har aðrar upphæddir innan sama øki eisini kunnu verða kunngjørdar, harundir barnagjald og hjúnafelagagjald.

Sum avleiðing av hesum er eisini neyðugt at broyta kunngerð um samsýning til fosturforeldur og kunngerð um áseting og javning av almannaveitinum.

Í kunngerð um samsýning til fosturforeldur verða upphæddirnar á lummapeningi hækkaðar, soleiðis at tær samsvara galdandi upphæddum í Danmark.

Í uppskotinum til leiðbeining um lummapening til børn, sum eru set theiman, verður greitt nærri frá ásetingini um lummapening.

Møguligar viðmerkingar skulu sendast til Almannamálaráðið á teldupost amr@amr.fo í seinasta lagi **fríggjadagin 21. august 2020.**

Vinaliga/Sincerely

Sólgerð Hjørleifsdóttir
Leiðsluskrivari/Management Secretary

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon +298 734006
solgerd.hjorleifsdottir@amr.fo • www.amr.fo